











# Hugnalig sethús í Leynum

Kundi tú hugsað tær á búð á bygd, men tó tætt við Havnina, er Leynar rættað staðið til tín.

Í Leynum er gott og friðarligt at búgva - og tó er Havnin við øllum sínum møguleikum bert 20 minuttir frá. Í Leynum er barnaskúli upp til 4 flokk, og eisini eru fleiri dagrøktarar til tey smærru børnini.

Húsini standa til vinstu, tá tú koyrir niðan eftir brekkuni. Húsini eru frá 1998 og eru í tveimum hæddum, í alt 256 fermetrar. Stílurin er romantiskur og sera hugnaligur. Øll rúmini eru ljós og løtt. Útsýnið er einastandandi og sært tú útyvir Leynasand, Vágoynna og Koltur.

Húsini eru deild uppí tvær eindir. Støddin á hvørjari eind er 128 fermetrar. Eingin brandmúrur er millum eindirnar og kunnu eindirnar sostatt ikki frámatrikulerast og seljast sum tvíhús. Tú hevur sostatt góðan møguleika at leiga út og fáa eitt eyka ískoyti til húsaleiguna. Hvør eind hevur tvær hæddir og í hvørjari eind er í niðaru hæddini ein stór gongd, baðirúm og køkur og stova í einum. Á báðum loftunum eru trý kømur og eitt kamar/klæðnarúm.

Køkurin og stovan eru í einum og er gott pláss til nógvar gestir ella eina stóra familju. Hvítvørurnar eru nýggjar, frá 2006 og sjálvur køkurin er hvítur og arbeiðsvinarligur.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1989 |
| Hæddir: | 2 |
| Stødd innan: | 256 fermetrar |
| Grundøkið: | 558 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 1.750.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**